gult10 cyan10 magenta10 svart10



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Illir inn á føroyskar og norskar línumenn

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Íslendskir línumenn eru illir inn á íslendsku myndugleikarnar, tí teir hava givið føroyingum og norðmonnum fiskirættindi eftir brosmu, longu og blálongu í býti við kvotur til íslendskar trolarar og nótabátar í Barentshavinum og við Føroyar.

Íslendsku línubátarnir eru illir um, at teir ikki fáa nakað burtur hesum kvotubýti, men aðrir partar av íslendska flotanum vinna upp á hetta, skrivar norska vevsíðan Intrafish.

Loynikróksavtalan, sum steðgaði íslendskum og føroyskum trolarum at fiska óskipað í Loynikrókinum, gevur íslendskum trolarum loyvi at fáa kvotur frá norðmonnum, kvotur, sum teir hava vunnið vegna søgulig rættindin, tí teir hava veitt í Loynikrókinum.

Afturfyri hesa avtalu sleppa føroysk og norsk línuskip at veiða í íslendskum sjógvi. Hetta ber eisini við sær, at íslenskir nótabátar og trolarar hava fingið munandi betri rættindir í føroyskum og norskum sjógvi.

– Vit hava ikki bara givið norðmonnum kvotur, vit hava eisini givið teimum heilar fiskigrunnar heilt fyri seg sjálvan. Í tíðarskeiðnum februar til mai eru íslendskir línubátar upptiknir av at fiska tosk, steinbít og hýsu á innaru leiðunum og tá skúma føroyingar og norðmenn róman av longu og brosmu á ytru leiðunum, sigur Petur H. Pállsson, sum umboðar íslendsku línubátarnar.

– Tað er ein sannroynd í línuveiðu, at tann sum kemur fyrst á eina leið, fær mesta fiskin. Tá umstøðurnar hjá okkum eru til at fara á ytru leiðirnar í summar, so er einki at fara eftir, sigur Petur H. Pállsson.

– Vit lata ein part av okkara fiskikvotu fyri at íslendskir trolarar skulu fáa kvotur í Barentshavinum og hesir trolarar nýta bert ein part av hesum kvotum.

Pállssson heldur, at tað er órættvíst at nótabátarnir ikki sjálvir gjalda fyri tey rættindi teir fáa í føroyskum sjógvi við at givið føroyingum størri rásarúm í íslendskum sjógvi at veiða lodnu og sild, heldur enn at sleppa føroyskum línubátum í íslendskan sjógv.



*Íslendingar illir inn á føroysk fiskirættindi*

## Íslendskt felag fær litauisku fiskidagarnar

Íslendska fyritøkan Balcan ehf hevur gjørt ein fimm ára sáttmála við Lithauia um fiskidagarnar á Flemmish Cap. Eitt íslensk skip, “Atlas” hevur júst flaggað til Lithavia og eitt annað skip skal eisini flaggað út, tá er trolarin “Eyðborg” frá Hrísey.

Eigarin av Balcan ehf, Sigurður Sigurgeirsson sigur í samrøðu við Inter Seafood.com, at litavar eiga 577 fiskidagar á Flemmish Cap og 3-400 fiskidagar í Barentshavinum og felagið hevur nú rætt at nýta hesar dagar.

Atlas byrjaði á svartkalvaveiðu um 12 mars og fór síðan á rækjuveiðu á Flemmish Cap nakað seinni. Hann hevur verið inni og landað 200 tons av rækjum og er nú aftur farin á svartkalvaveiðu á Flemmish Cap.

**je**

## Ferðamenn veiða fyri 200 mió kr.

Trondheim(NTB) Útlendskir ferðamenn í Noregi fiska eini 15.000 tons af fiski um árið. Og hetta svarar til eitt virði af 200 millíónum norskum krónum, vísir ein frágreiðing frá universitetinum í Tromsø.

– Eg eri bilsin yvir, at talan er um so stórar nøgdir, sigur Jan Skjærvo, aðalskrivari í Norges Fiskerlag.

–Vit hava hoyrt so nógvar gitingar um hvussu nógv ferðafólk fiska í Noregi og tí vildu vit hava eina óhefta kanning av hesum. Vit hava einki í móti at ferðafólk veiða fisk, sigur Skjærvo, sum sigur, at Fiskerlaget fer at viðgera hesar nýggju upplýsingar í næstum.

Nøgdin svarar til at sum eitt nýmótans stórt fiskavirki hjá Findus virkar um árið.

Hvat norðmenn sjálvir fiska í frítíðini er ikki við í kanningini

**je**

## Watson skuldsetir norðmenn fyri ólógligan útflutning

Kendi umhvørvisaktivisturin Paul Watson skuldsetir norðmenn fyri at útflýta ólógliga hvalatvøst til Japan. Hann sigur seg hava prógv fyri hesum, men vil ikki leggja prógvini fram fyri norsku vevsíðuni Intrafisk, sum ber tíðindini í gjár.

– Vit eru í móti allari handilsligari hvalaveiðu og tað er okkum líka mikið, at Noreg hevur minkað um talið av sildrekum, sum loyvt er at veiða.

– Japan vil keypa alt tað tvøst teir kunnu fáa hendur á uttan fyrilit til moral ella um hetta er lógligt. Vit hava prógv fyri gjøgnum DNA kanningar, at norskt sildrekatvøst er at fáa í japanskum handlum. Tað fæst eisini finnhvala og bláhvalatvøst í japanskum handlum, sigur Paul Watson.

**je**

# Gólvsølan

**71 bátar seldu 19 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mikudagin.**
**Av hesum vórðu 10 tons seld í Vági, meðan hini nýggju vórðu seld í Sørvági**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 136 | Lilja | snella | 398 |
| FD 380 | Amanda | snella | 396 |
| FD 89 | Høvdin | snella | 417 |
| FD1140 | Eyðin | snella | 388 |
| KG 888 | Rannvá | snella | 348 |
| TG 10 | Evi | snella | 184 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 173 |
| TG 184 | Ørvur | snella | 114 |
| TG 185 | Egil | snella | 212 |
| TG 201 | Britt | snella | 74 |
| TG 227 | Edvør | lína | 449 |
| TG 26 | Majbritt | snella | 333 |
| TG 283 | Herdis | snella | 386 |
| TG 303 | Richard í smiðjuni | snella | 154 |
| TG 310 | Sjóriddarin | snella | 215 |
| TG 339 | Báran | snella | 137 |
| TG 347 | Knúkin | snella | 281 |
| TG 349 | Trý drangur | snella | 247 |
| TG 376 | Dúgvan | snella | 161 |
| TG 397 | Kvikk | snella | 192 |
| TG 40 | Kambur | snella | 273 |
| TG 401 | Barbara | snella | 182 |
| TG 435 | Jórun | snella | 159 |
| TG 471 | Núpur | lína | 463 |
| TG 487 | Topas | snella | 180 |
| TG 495 | Egil m | snella | 179 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 111 |
| TG 522 | Grammur | snella | 242 |
| TG 523 | Sóley | snella | 238 |
| TG 55 | Bláaberg | snella | 147 |
| TG 555 | Ann mari | snella | 175 |
| TG 56 | Marian m. | snella | 228 |
| TG 562 | Todnes | snella | 125 |
| TG 576 | Svanur | snella | 234 |
| TG 620 | Bergur II | snella | 388 |
| TG 622 | Varðin | snella | 223 |
| TG 631 | Skarstein | snella | 1.130 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 202 |
| TG 731 | Annie m/b | snella | 377 |
| TG 744 | Marjun | snella | 424 |
| TG 75 | Nemo | snella | 344 |
| TG 797 | Norðfarið | snella | 312 |
| TG 808 | Poul S. | snella | 286 |
| TG 91 | Stjørnan | snella | 192 |
| TN 149 | Ørvur | snella | 385 |
| TN 912 | Heine | snella | 305 |
| TN 976 | Finnurin | snella | 186 |
| VA | | Anny | snella |
| 221 | | | |
| VA | | Álkan | snella |
| 221 | | | |
| VA 105 | Barið | snella | 169 |
| VA 109 | Ella | snella | 312 |
| VA 111 | Sigga | snella | 321 |
| VA 143 | Thurid | snella | 447 |
| VA 164 | Niklái | snella | 285 |
| VA 190 | Sjóberið | snella | 343 |
| VA 192 | Havfrúgvin | snella | 187 |
| VA 221 | Carina | snella | 322 |
| VA 242 | Suðurfarið | snella | 209 |
| VA 245 | Sunnvá | snella | 167 |
| VA 251 | Elvira m/b | snella | 145 |
| VA 269 | Anna Maria m/b | snella | 184 |
| VA 28 | Álitið | snella | 214 |
| VA 294 | Nestangi | snella | 477 |
| VA 300 | Cemary m/b | snella | 492 |
| VA 324 | Skarvur | snella | 374 |
| VA 327 | Fortuna m/b | snella | 172 |
| VA 34 | Dunga Hans m/b | snella | 326 |
| VA 350 | Sirið | snella | 261 |
| VA 60 | Dáva Dánjal | snella | 208 |
| VA 66 | Gunnvá | snella | 236 |
| VA 82 | Raðnes | snella | 269 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 0 | 64 |
| Hýsa 0 | 17 |
| Hýsa 2 | 69 |
| Hýsa 3 | 264 |
| Hýsa 4 | 18 |
| Havtaska 0 | 3 |
| Kalvi 1 | 63 |
| Longa 2 | 5 |
| Longa 5 | 2 |
| Skrubba | 2 |
| Steinbítur | 5 |
| Svartkalvi 0 | 12 |
| Toskur 1 | 21 |
| Toskur 2 | 478 |
| Toskur 3 | 5.451 |
| Toskur 4 | 8.421 |
| Toskur 5 | 3.834 |
| Upsi 0 | 307 |
| Upsi 2 | 49 |
| Upsi 3 | 92 |
| Upsi 4 | 28 |
| Upsi 5 | 85 |

gult11 cyan11 magenta11 svart11

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 4. mai til hósdagin 10. mai**

## Fangað í Amazonas




*Leygardagin klokkan 20 fer TV3 undir eina nýggja amerikanska actionraðsending. Eitt flogfar neyðlendir í Amazonas frumskóginum, tá ódnarveður knappliga brestur á.*

*Eitt bjargingarlið vinnur fram til vanlukkustaðið, men ger bara tað mest neyðuga og sleppur sær síðani avstað aftur, av tí at frumskógurin ikki er eitt trygt stað hjá fólki at vera. Tá bjargingarliðið er farið, rakna seks ferðafólk við aftur eftir at hava verið uttan vit.*

## Sjónleikur og annar leikur.

*Marna Jakobsen ummælir:*



Tað tykist sum listin blómar í Føroyum: heili 4 sjónleikir á palli í senn, 39 stuttsøguhandrit verða latin inn til kapping um, hvør er best, stórt Prix Føroyar tiltak í Norðurlandahúsinum og ivaleyst mangt annað eisini. Útvarp og sjónvarp royna sum frægast at kunna um hetta. Ein morgun var leikari úr Klaksvíkar Sjónleikarafelag og greiddi væl frá teirra leiki og tað at spæla sjónleik í heila tikið, m.a. at vit vilja hava undirhald og ikki sovorðið har vit noyðast at taka støðu. Havi tó onki hoyrt um leikin á Strondum ella »Músafelluna« í Havn, men møguliga hevur okkurt verið.

Malan Johannessen hevur gjørt sending um sjónleikaraveteranin Linu Larsen, ein deiliga avslappandi sending, har greitt varð frá í frið og náðum. Tá ið sendingar verða gjørdar, er mangan sovorðið hóvasták við mikrofonum og filmstólum, at tú næstan noyðist at leggja teg afturá, tí at tú er um at gerast í ørviti. Komið í hesum sambandi at hugsa um donsku sjónvarpsrásina DK4, sum hevur sum aðalmál at upplýsa og at ger hetta á slíkan hátt, at fólk sleppa at tosa seg liðug.

Tað er so mangan, tá ið eg lurti eftir samrøðum, at eg aftaná havi fleiri spurningar, sum eg vil hava svaraðar. Eitt dømi var nú ein dagin, tá ið útvarpið tosaði við løgfrøðing úr Undirvísingar- og Mentamálastýrinum um val av skúlastýri. Har valdar ruðuleiki í reglugerðini, eingin ivi um tað, umframt tað høpisleysa í at sambúgvandi pápar ikki hava rætt at ávirka skúlagongdina hjá børnum sínum, so eru føroysk foreldur býtt upp í 1. og 2. flokks foreldur, av tí at sambúgvandi foreldur, ið hava búð niðri og hava eina foreldraavtalu haðani, kunnu velja og veljast til skúlaráðini. Hetta spurdi tíðindamaðurin ikki um, heldur ikki um tað er rímuligt at broyta lógina, tá ið hjúnarbandslógin frá 1928 als ikki livir upp til nútímans krøv.

Tá ið tú lurtar eftir útvarpi eru ongar myndir sum órógva, so tú leggur teg meira eftir, hvussu alt verður framborið.

Havi fleiri ferðir hesa vikuna leita mær ráð í føroysku orðabókini, m.a. ein dagin útvarpið boðaði frá, at nú var klekingardepil settur á stovn. Eg, mítt býtta fyl, helt í fyrstani, at nú fór Annfinn Brekkstein á Velbastað at byggja út, men av samanhanginum gitti eg at enda, at tað hevði okkurt við KT-vinnu at gera. Eg fann ikki orðið í orðabókini, so allarhelst er hetta spildurnýtt orð, eg fari helst leingi at fáa associatiónir til egg, tá eg hoyri orðið í framtíðini.

Orð, ljóð og tónalag er fangandi, tá ið tað verður væl framborið. Munur er á Hans Tórgarð og Jens Paula Heinesen. Báðir lesa upp í útvarpinum, himmalvíður munur er á tí friðarliga Hans Tórgarð og tí harðmælta Jens Paula við teimum eyðkendu rungandi r´unum úr Vágum. Mær dámar betur Jens Paula, møguliga er tað tí, at mær dámar betur søgurnar hjá honum, men eg haldi eisini at Hans Tórgarð er í so lívleysur, tá ið hann lesur.

Jógvan Arge hevur havt frálíkar sendingar úr Moskva, eg var so skjót í seinasta ummæli, at finnast at honum, tí at hann ikki brúkti henda møguleikan at gera sending um Moskva, men tað hevur hann gjørt, og tær vóru spennandi at lurta eftir.

Fyri fleiri árum síðani funnu vit útav, at vit kundu spæla plátur ella fáa eitt band eitt ljóða sum ”músarøddir”, tað eru gomul tíðindi, men í útvarpinum er hetta framvegis spildurnýtt, nærum hvør einasta barnasending brúkar hesar avskeplaðu røddirnar. Haldi mangan at børn, sum ringja til útvarpið, ikki skilja hendan fitta fýrin við tí løgnu røddini. Tað er stuttligt og mennandi fyri børn, at sleppa at tosa og síggja seg sjálvi í útvarpi og sjónvarpi, men t.d. sendingin ”Fres” nøktar ikki tørvin hjá børnum, her má arbeiðast meira miðvíst við at skapa góðar barnasendingar til ymiskar aldursbólkar.

So hevur ísraelski diplomaturin í Danmark verið her. Frætti í bløðunum at bert Dagblaðið hevði verið á tíðindafundi, og at útvarpið at enda hevði tikið seg saman og hevði havt eina samrøðu við hann. Eg hoyrdi hesa samrøðu og fekk tað fatan, at tað bert vóru fólkaflokspolitikarar, ið høvdu bjóðað honum vælkomnum. Ørindi hansara vóru sjálvandi at sjarmera seg inn hjá okkum , og tað eyðnaðist honum so væl, at útvarpsmaðurin næstan bað um umbering, tí hann mátti spyrja onkrar politiskar spurningar, og diplomaturin dugdi sítt arbeiði til fulnar og svaraði á diplomatiskan hátt.

Las í seinasta blaðið hjá ”Folkekirkens Nødhjælp”, at donsk sendinevnd hevur verið í Ísrael og í palestinsku økjunum har. Tað vóru ”Det mellemkirkelige Råd”, ”Det økumeniske Fællesråd” og ”Folkekirkens Nødhjælp”, sum hava sent hesi umboð avstað, og aftaná hava tey so tosað við Mogens Lykketoft um m.a. viðurskiftini hjá teimum umleið 120.000 kristnu har og annars givið frágreiðing um støðuna í økinum. Eitt av tí, ið dentur varð lagdur á, var at arbeiða fyri, at handilsavtalan millum Ísrael og ES skuldi vera hildin, har eitt krav í hesari avtalu er at halda mannarættindi. Hetta kundu føroysk tíðindafólk havt í huganum, nú Bjarni Djuurholm ætlar at gera fríhandilsavtalu við Ísrael.

Spurningurin er so, um tað var rætt at fjølmiðlarnir ikki fóru á tíðindafund, tað er ein spurningur um at tiga í hel ella at tosa í hel.

## Fres – av Eiði




## "Tað bera salt"




## Red Corner




## Skaðastovan

